Álit

í

løgtingsmáli nr. 38/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir (Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av uttanlandsfrádráttinum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Samtak, Føroya Fiskimannafelag og Maskinmeistarafelagið, Áhugafelagið Antares, Landsfelag pensjónista, Reiðarafelagið, Skipara- og navigatørfelagið, Vinnuhúsið, Kommunufelagið, Búskaparráðið, Landsbankan og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot er ein avleiðing av løgtingsmáli nr. 37/2023, har fiskimannafrádrátturin verður stigvíst minkaður og uttanlandsfrádrátturin avtikin.

Endamálið við uppskotinum er, at endurgjaldið til kommunurnar lækkar við somu upphædd, sum skattainntøkur teirra hækka vegna ávikavist minking og avtøku av frádráttunum.

Fyri at tryggja, at kommununar fáa rætt afturberingarprosent eftir skattaumleggingina og samsvarandi broytingum hjá meirilutanum viðvíkjandi uttanlandsfrádrátti, er neyðugt at gera tillagingar í afturberingarprosentinum fyri 2027 og fram.

Tí setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskimannafrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)"

2. Í § 1, nr. 2 verður § 4, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Í 2024 er endurgjaldið samsvarandi 15,3 prosent av frádráttinum, í 2025 er endurgjaldið samsvarandi 11,5 prosent, í 2026 er endurgjaldið samsvarandi 9,6 prosent, í

2027 er endurgjaldið samsvarandi 12,7 prosent og frá 2028 er endurgjaldið samsvarandi 19,1 prosent.”

Viðmerkingar

Til nr. 1:

Við broytingaruppskoti frá meirilutanum í løgtingsmáli nr. 37/2023 verður ikki longur talan um avtøku av uttanlandsfrádráttinum, men um stigvísa minking. Tí verður frágreiðandi heitið til hesa lóg um tillaging av endurgjaldi til kommunurnar broytt samsvarandi.

Til nr. 2:

Við hesi broyting verður satsurin fyri endurgjald til kommunurnar í sambandi við uttanlandsfrádráttin tillagaður, soleiðis at hann samsvarar við broytingaruppskot meirilutans í álitinum í løgtingsmáli nr. 37/2023, sí talvu niðanfyri.

	Upprunauppskot			**Sbrt. broytingaruppskoti til lm. 37/2023**		
Ár	**Uttanlands-frádráttur**	**Lutfall**	**Endur-gjald**	**Uttanlands-frádráttur**	**Lutfall**	**Endur-gjald**
2022	120.000	1,00	19,1%	120.000	1,00	19,1%
2023	120.000	1,00	19,1%	120.000	1,00	19,1%
2024	96.000	0,80	15,3%	96.000	0,80	15,3%
2025	72.000	0,60	11,5%	72.000	0,60	11,5%
2026	48.000	0,50	9,6%	48.000	0,50	9,6%
2027	24.000	0,33	6,4%	48.000	0,67	12,7%
2028	-	-	0,0%	48.000	1,00	19,1%

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið er ein avleiðing av, at landsstýrið velur at skerja skipanir, ið verða veittur teim, ið arbeiða uttanlands, og tí eisini afturbering til kommunurnar.

Minnilutin vísir í hesum sambandi til minnilutaálitið í løgtingsmáli nr. 037/2023.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	